

sjónvarp

Leygardagin 15. september

19.30 **Tom Sawyer og Huckleberry Finn 7** (13)
20.15 **Grøna fátækradømið**
2955 **Hugsjónarrák í USA**
21.55 **Junglubókin** — am. filmur
23.35 **Liðugt**

Sunnudagin 16. september

15.00 **Tónleikur mær dámar**
16.00 **Gudstænasta**
19.30 **Hestatjóvarnir**
21.00 **Svikarar 1** (3)
22.05 **Elenora Kristina og Jammersminde 1** (2)
22.40 **Data, datalæra, datalærarar**
23.15 **Andakt**
23.20 **Liðugt**

Svikarar

Hetta er sendirød í tveimum pørtum, sum svenska sjónvarpið hevur gjørt.

Bertilsson (Bjørn Gustafson) er rektari og vísir seg at liva eitt vanligt familjulív. Hann eigur sethús, summarhús og bil, eins og hann er væl umtóktur persónur. At sami maður hevur verið bankatjóvur, merkist ikki soleiðis beinleiðis.

Bertilsson er beiggi til Bo Brand (Lasse Strømstedt), sum roynir ymisk skálkabrøgd. Helena Bodin er kona rektaran, sjúkrasysturin Violet er Gunilla Olsson og hon er saman við ævintýrkendu prestakonuni, sum Birgitte Valberg spælir.

Sendirøðin Svikararnir er eftir skaldsøgu hjá Tomas Arvidsson, sum í dagliga yrki sínum var rektari í Kalmar.

Svenska sjónvarpið sigur, at hetta er ein familjuvinarlig sending, sum hóast spenning, ikki vísir likamligan harðskap.

Brøðurnir Bertilsson og Brand fyrireika tað fullkomna brotsverkið, sum snýr seg um falska lívstrygging. Teir vita ikki, at Violet, sjúkrasystir saman við prestaeinkjuni fyrireika at ræna eitt posthús, har svenskarar inngjalda skattapening.

Sunnudagin kl. 19.30

Hestatjóvarnir

Hetta er austalsur filmur, um ungfólk, sum hava mist burtur ein dýrabaran hest.

Tey fara tí út á flatlendið at leita eftir hestinum og tjóvunum, sum hava stolið hann. Tey finna bæði hest og tjóvar, men nú kemur fram, at tjóvarnir ikki eru vanligir brotsmenn. Teir hava orsøk til at stjala hestin.

Sunnukvøldið kl. 22.05



Jammersminde

Tað er kenda danska sjónleikarkvinnan Bodil Ipsen, sum hevur høvuðsleiklutin í sjónleikinum »Eleonora Christinas Jammersminde«. Upptøkan er gjørd í 1956, sum er í tveimum pørtum.

Fyrsti partur hevur heitið »De treogtyve dage« og annar partur «De toogtyve år«.

Eleonora Christina, dóttir Kristian kong fjórða, bleiv 15 ára gomul gift við Corfitz Ulfeldt. Av ymiskum orsøkum gjørdist umstøðurnar soleiðis hjá hjúnunum, at maðurin bleiv landasvíkjari og Leonora Christina kom somuleiðis undir illgruna. Fyri Leonoru Christinu fekk tað avleiðingar, at hon fór í fongsul í 21 ár, niggju mánaðar og 11 dagar.

Meðan kongsdóttirin sat í fongsli, hendi ein umfevnandi broyting við tí ungu kvinnuni, — frá at vera spilt kongadóttir til at gerast hámett aðalfrúa. Í bók síni »Jammersminde« hevur Leonora Christina greitt frá hesum hendingum, sum í sjónvarpsumskrivingini hava fingið heitið »De treogtyve dag« um tíðina, tá hon varð sett í Blåtorn. Næsta sendingin »De toogtyve år« er um árini, áðrenn hon varð latin leys aftur.

Leygarkvøldið kl. 20.15

Grøna fátækradømið

Í Bangladesh sýnist alt so grønt og fruktagott, men so er ikki í veruleikanum. Aftanfyri vakurleikan er fátækradømi og bardagin fyri at yvirliva vanligi gerandisdagurin fyri flestu íbúgvararnar.

Tað er Jens Ravn, danskur filmstjórin, ið hevur gjørt stuttfilmin, sum hann nevnir »Grøna fátækradømi« fyri Damarks Radio og Filmcentralen, við stuðli í Danida.

Upptøkurnar eru gjørdar í Noakhali í Bangladesh, har danir royna at hjálpa fátækrafólkinum at fáa eitthvørt tiltak á føtur, sum kann bøta um livikorini.

Filmurin snýr seg um teir trupulleikar, sum fátækrafólkið hevur at berjast við í einum ættarsamfelag, sum eftir landsins siði kúgar kvinnurnar, har átrúni hevur stóran leiklut og har munurin á fátækradømi og ríkidømi er so stórt. Filmurin myndar eisini, hvussu torført tað hevur verið at bygt upp royndarprojektið, tí rotinskapurin innan landsins fyrisiting er so stórur.



Leygarkvøldið kl. 21.55

Junglubókin

Hetta er filmur frá 1942, eftir Kipling søguni um Mowgli, dreingin, sum varð uppaldur millum villdjórini í frumskóginum. Ein tikari ger seg inn á fólkini í landsbygdini, og tvey ára gamli smádrongurin Mowgli flýggjar út í skógin. Her tekur ein úlvaflokkur Mowgli til sín. Tikarin, sum eitur Shere Khan leitar framvegis eftir Mowgli. Drongurin missir kortini ikki sambandið við heimbygdina. Hann hittir mammu sína Messua, men hini bygdafólkini halda hann vera ein illur andi. Hetta førir við nógvar spennandi upplivingar við sær kortini, og Mowgli fer eisini á skattajakt einaferð.